Jørgen Niclasen
Vegna Fólkaflokkin

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um afturrindan av heilsutrygdargjaldi

§ 1

Í løgtingslóg nr. 87 frá 7. mai 2025 um afturrindan av heilsutrygdargjaldi verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 1, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Persónar, sum frá 1. november 2014 til og við 2023 hava goldið heilsutrygdargjald sambært § 24, stk. 1 í heilsutrygdarlógini, og sum sama ár hava rindað heilsutrygdargjald í øðrum Norðurlandi og tí kunnu fáa frítøku í Føroyum, vísandi til Nordisk konvention om social sikring, hava rætt til eftir umsókn at fáa afturgoldið heilsutrygdargjald sambært hesi løgtingslóg."

2. § 1, stk. 2 verður strikað.

3. § 2 verður orðað soleiðis:
"**§ 2**. Umsókn um at fáa afturgoldið heilstrygdargjald verður send TAKS umvegis talgildu sjálvgreiðsluna hjá TAKS.
Stk. 2. TAKS útvegar skjalprógv fyri, at viðkomandi umsøkjari hevur rindað sosialtrygdargjald í øðrum Norðurlandi sambært Nordisk konvention om social sikring, samstundis sum at viðkomandi hevur rindað heilsutrygdargjald í Føroyum, eins og aðrar neyðugar upplýsingar.
Stk. 3. Umsøkjarin skal skjalprógva, um og nær hann hevur gjørt vart við, at hann hevur rætt til rentu sambært lov om renter ved forsinket betaling v.m.
Stk. 4. TAKS sendir fyribils niðurstøðu í málinum til viðkomandi umsøkjara. Møguligar viðmerkingar skulu vera TAKS í hendi innan 4 vikur eftir, at viðkomandi umsøkjari hevur móttikið fyribils niðurstøðuna. Eftir hetta tekur TAKS endaliga avgerð í málinum."

4. § 3, stk. 2 verður strikað.
Stk. 3 verður eftir hetta stk. 2.

5. § 6 verður strikað.
§§ 7 og 8 verða eftir hetta §§ 6 og 7.

6. § 7, sum verður § 6, verður orðað soleiðis:
"**§ 6**. Avgerðir sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til landsstýrisfólkið innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið kann leggja kærumyndugleika sín eftir løgtingslógini til kærustovn, hvørs avgerðir eru endaligar innan fyrisitingina."

7. Í § 8, stk. 1 og 2, sum verður § 7, stk. 1 og 2, verður “1. januar 2026” broytt til: “1. januar 2027”.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Almennar viðmerkingar
Uppskotið hevur til endamáls at øll, sum av órøttum hava goldið heilsutrygdagjald, fáa hetta endurgoldið á ein einfaldan hátt. Sambært hesum uppskotinum verður alt heilsutrygdargjaldið endurgoldið, og møguligur frádráttur í skattinum sambært § 154 b í skattalógini verður ikki drigin frá, áðrenn afturrindað verður.

Persónar, sum hava havt arbeiði hjá norskum feløgum hava í mong ár rinda heilsutrygdargjald í báðum londum. Tað er staðfest, at hetta er í stríð við Nordisk konvention om social sikring, sum Føroyar hava bundið seg til.

Kærustovnurin hevur longu í 2014 staðfest, at hesir persónar eiga bert at rinda í einum stað, og eiga tí at fáa peningin endurgoldnan, sum teir av órøttum hava rinda til Heislutygd.

Landsstýrið valdi at leggja málið fyri Føroya Rætt, men fekk ikki viðhald. Landsstýrið valdið síðan at fara í Landsrættin við hesum persónum, men tann dómurin staðfesti fyrru avgerðirnar í kæruskipanaini og í Føroya Rætti.

Hetta málið hevur verið í skipanini í sera langa tíð, og tað er einki at taka seg aftur í, at hetta er til lítlan sóma fyri politikarar, stovnar og embætisverk.

Aftaná meira enn 10 ára stríð hjá privatpersónum, kom uppskot í Løgtingið í vár, sum skuldi endurrinda gjaldið, hesir av órøttum høvdu goldið.

Løgtingið samtykti lógina, men tað er ein lóg, sum leggur upp til eina torføra og umsitingarliga tunga viðgerð, sum krevur nógva orku og arbeiði, við tí úrsliti at møguliga einans ein partur av teimum pengum, sum eru kravdir inn av órøttum, verða útgoldnir. Tvs. bert summi fáa endurgoldið.

Hetta vil elva til stóra misnøgd – so mikið stóra, at tað kann enda við sakarmálum. Hetta merkir, at málið ikki verður endaliga loyst, og at skipanin framhaldandi fer at brúka tíð, orku og pengar uppá tað.

Fyri at geva borgarunum ein rættvísan møguleika at fáa peningin aftur, verður freistin at senda umsókn longt frá 1. januar 2026 til 1. januar 2027.

Fyri at fáa eitt endaligt skilagott uppgerðararbeiði og fyri at ivamál og rættarniðurstøðan veruliga skulu koma borgarunum til góðar, verður fyriliggjandi uppskot sett fram.

Avleiðingar av uppskotinum
Mett verður ikki at uppskoti hevur umsitingarligar avleiðingar, tí TAKS skal framvegis viðgerða allar umsóknir, eins og í verðandi lóg.

Í vár metti TAKS at í 10 ár var heilsutrygdargjald kravt inn av órøttum fyri uml. 22 mió kr. Fyriliggjandi uppskot tryggar at øll, sum hava goldið inn av órøttum, fáa hetta endurrinda. Tí er metingin við hesum uppskotið óbroytt í mín til lógina, sum var samtykt í vár.

Galdandi lóg kom í gildi í vár, og væntast kann, at fleiri persónar hava søkt og fingið avgerð frá TAKS um at fáa heilsutrygdargjald afturgoldið. Broytingin í uppskotinum hevur til endamáls at víðka um heilsutrygdargjaldið, ið kann søkjast um at fáa afturgoldið, við tað at frádráttur sambært § 154 b í skattalógini ikki verður drigin frá, áðrenn afturrindað verður. Teir

persónar, ið hava fingið svar uppá umsókn sambært galdandi lóg, kunnu, um fyriliggjandi uppskot verður samtykt, søkja av nýggjum.

Serligar viðmerkingar

Til § 1
Ásett verður, at persónur, sum hevur rindað heilsutrygdargjald í Føroyum samstundis, sum viðkomandi hevur rindað heilsutrygdargjald í øðrum Norðurlandi, hevur rætt til, eftir umsókn, at fáa heilsutrygdargjaldið, ið er rindað í Føroyum, afturgoldið. Broytingin er tann, at tað verður staðfest, at viðkomandi hevur rætt til at fáa ov nógv goldna heilsutrygdargjaldið í Føroyum afturgoldið í mun til orðingina í upprunauppskotinum um at viðkomandi kann fáa heilsutrygdargjaldið afturgoldið. Hetta er tó treytað av, at viðkomandi lýkur tær treytir, ið eru galdandi, undir hesum at viðkomandi ikki hevur havt "en væsentlig del af sin beskæftigelse i bopælsstaten" í ein slíkan mun, at viðkomandi harvið missir rættin til afturrindan av heilsutrygdargjaldi.

Til § 2
Broytingin hevur við sær, at frádráttur sambært § 154 b í skattalógini ikki verður drigin frá heilsutrygdargjaldinum, ið viðkomandi persónur sambært § 1, stk. 1 hevur rætt til og kann fáa útgoldið.

Til § 3
Broytingin hevur við sær, at tað verður TAKS, og ikki umsøkjarin, ið hevur ábyrgdina av at fáa til vegar skjalprógv fyri, at viðkomandi umsøkjari hevur rindað sosialtrygdargjald í øðrum Norðurlandi samstundis, sum at viðkomandi hevur rindað heilsutrygdargjald í Føroyum. Her er talan m.a. um at kanna sjálvuppgávuna hjá viðkomandi umsøkjara. Eisini er tað TAKS, ið hevur ábyrgdina av at fáa til vegar møguligar aðrar neyðugar upplýsingar, ið eru av týdningi fyri viðgerðina av málinum. Tað verður tó framhaldandi umsøkjarin sjálvur, ið skal skjalprógva, um og nær hann hevur gjørt vart við, at hann hevur rætt til rentu. Fyri at tryggja, at allar viðkomandi upplýsingar eru í málinum, og at avgerðin er grundað á røttu upplýsingarnar, verður fyribils niðurstøða í málinum send umsøkjaranum. Metir umsøkjarin, at viðkomandi upplýsingar ikki eru tiknar við í viðgerðina, ella at fyribils niðurstøðan av øðrum orsøkum ikki er rætt, skal umsøkjarin innan 4 vikur gera sínar viðmerkingar galdandi mótvegis TAKS. Eftir hetta tekur TAKS endaliga avgerð í málinum. Henda avgerð kann sambært § 7 kærast til landsstýrisfólkið.

Til § 4
Avleiðing av at frádráttur sambært § 154 b ikki verður drigin frá heilsutrygdargjaldinum, ið viðkomandi persónur sambært § 1, stk. 1 hevur rætt til.

Til § 5
Av tí at tað verður TAKS, og ikki viðkomandi umsøkjari, ið hevur ábyrgdina av at fáa til vegar skjalprógv – og møguligar aðrar upplýsingar – í málinum, verður ásetingin strikað.

Til § 6
Við broytingini verður rætturin at kæra avgerðir sambært løgtingslógini tryggjaður.

Til § 7
Verðandi lóg fer úr gildið longu 1. januar 2026. Hendan broyting ásetur at lógin ikki fer úr gildið fyrr enn 1. januar 2027 og at umsóknir kunnu sendast inn líka til 1. januar 2027.

Á Løgtingi, dagfesting

Jørgen Niclasen